VIÐMERKINGAR

# Áheitan frá Felagnum MBD/DAMP í Føroyum

**Bára Johansen**
*Formaður í Felagnum MBD/DAMP í Føroyum*



Vit í felagnum MBD/DAMP í Føroyum eru ørkymlað av støðuni, ið nú hevur tikið seg upp viðvíkjandi umrøðu av okkara børnum í sambandi við stovnin fyri børn við atferðartrupulleikum.

Okkara neyðarróp er, at høgt mettir psykologar í høgum starvi eru farnir inn á øki, har teir hvørki hava nógv nógva vitan ella nóg hollar royndir. Teir koma við villleiðandi útsagnum og beinleiðis lygnum um viðgerð, ið skal eitast at vera í okkara landi.

Okkara áheitan á tykkum, avvarðandi myndugleikarar og politikarar, skal tí vera, at tit fáa greiði á, hvør hevur ábyrgdina av, at støðan er vorðin, sum hon er.

Støðan er tann, at okkara børn nú hava fingið eitt heldur løgið heiti. Nú eru tey børn og ung, ið hava atferðar- og tilknýtistrupulleikar. Tað verður eisini sagt, at tveir stovnar eru í landinum fyri okkara børn. Her koma okkara børn í viðgerð - verður sagt.

Hetta er rætt og slætt lygn!

Her er hvørki stovnur ella viðgerð. Og gott tað sama. Tí umrøðan og hugburðurin eru farin heilt av leið.

Hjá børnum og ungum við DAMP, ið alla tíðina "fara av leið", verða misskilt og útskeldað, er tað sera umráðandi at verða sædd, virðismett og viðurkend. Tey skulu vita, at foreldur og onnur skilja, at atferð teirra kemst ikki av tvørrandi vilja, men tvørrandi føri.

Eitt inntriv beinanvegin er umráðandi til tess at sleppa undan, at børnini eru óneyðugt við undirlutan í heilum. Arbeiðið má skipast eftir tí einstaka barninum.

Hetta er veruleikin, sum vit heita á tykkum um at royna at skilja. Og vit eru fús at hjálpa tykkum at skilja veruleikan.

Okkara ynski er, at vit fáa servitan til Føroya. Vit heita aftur á Hans Paula Strøm, landsstýrismann í almanna- og heilsumálum, um at fáa Christopher Gillberg, professa úr Göteborg hendavegin. Christopher Gillberg, sum fleiri ferðir hevur verið í Føroyum, hevur boðið sær til í neyvum samstarvi við føroyingar at skipa fyri útbúgving av fakfólki, ið eru før fyri at diagnostisera og viðgera børn við ADHD/DAMP.

# ÁTJANDI SEPTEMBER 1945
# Terror- og skammardagur Føroya

**Virgar T. Dalsgaard**



Sum flestu tilkomin fólk vita, men *langt* frá allur okkara ungdómur, so er 18. september ein heilt serligur dagur í okkara nýggjastu søgu - („nýggj" søga er fyri seriøsar søgumenn alt, sum er yngri enn eina øld!) Sunnudagin í hesum vikuskifti eru farin eksakt *trýss* ár síðani, at vitleysir politiskir terroristar **royndu at spreingja okkara parlament – *Løgtingshúsið* – í smæsta smildur!**

Bumban brast stutt niðanfyri fundarhøli javnaðarmanna! Hetta hendi stutt eftir, at Petur Mohr Dam og aðrir leiðandi javnaðarmenn høvdu sitið í fundarhølinum og arbeitt. Tað var eitt Guds undur, at eingin mannskaði hendi.!

Menn hildu ein lítlan arbeiðssteðg, har teir vóru farnir niðan í snikkarastovu at fáa sær ein drekkamunn, rindaðu møðina eina løtu og ætlaðu sær skjótt omanaftur í løgtingið at arbeiða, men meðan teir sótu til borðs, brast bumban og skakaði alt grannalagið í miðbýnum!

Tingakrossur, Dimmalætting og Sosialurin vóru øll meira og minni samd um, at so uppøstur og ógvisligur sum politiski terrorstemningurin varð blivin í sambandi við tey hatsku álopini á Danmark og føroysk samríkisfólk, var valla ivi um, at hetta var ein attentatroynd við týðiligum politiskum fullveldismotivi! Hetta var um somu tíð sum loysingarpøbil meiggjaði út húsini hjá Louis Zachariassen, blaðstjóra Tingakrossar, nátt eftir nátt við fólkalorti og eyðmýkjandi invektivum, samstunds sum grovur telefoniskur terror móti Louis eisini var gerandiskostur!

**Flaggað skuldi verðið við hálvari stong á hvørjum ári**

Løgtingsbumbingin er næstan fortrongd í Føroyum! Ja, hesin sjáldsama álvarsami tilburður er merkiliga nógv tagdur í hel av okkara søgufólki, og hann er heilt lopin um í okkara søgubókum. At burturtiga søgulig ýti er ikki nógv mætari enn at lúgva um tey! Effektin er stórt sæð tann sama!

Í øllum øðrum londum hevði dagurin fyri eitt terrorálop á sjálvt parlamentið ikki bara verið viðgjørdur í landsins søgubókum - hann hevði eisini verið markeraður sum nationalur sorgardagur, har flaggað varð í hálvari stong á øllum almennum bygningum; - harumframt hevði tilburðurin eisini verið umrøddur hvørt ár í landsins skúlum. Á arbeiðsplássum hevði 2 minuttirs tøgn fyri slíkan nationalan terroristørskap eisini verið bæði rímuligt og hóskandi!

Latið ongantíð hesa andstyggiligu terrorist-gerð fara í gloymibókina! Latið hvørt einasta føroyskt mansbarn fáa alla terrorsøguna, sum hon er. So mugu tey sjálvi hugsa og døma!

Sjálvt fólkaflokkurin kann í dag ikki hava nakað ímóti, at hesin *terrordagur* verður markeraður, tí allir teir steinøru loysingarmenninir, sum tá vóru í fólkaflokkinum, fóru stutt eftir yvir í nýstovnaða tjóðveldisflokkin, sum síðani á loysingarøkinum hevur monopoliserað ørskapin og hýst næstan øllum teimum mest fanatisku rabulistunum. Eftir at tjóðveldisflokkurin varð stovnaður, gjørdist fólkaflokkurin næstan púra avlúsaður fyri politiskar fundamentalistar og annað órudd!

Brand-aktuella uppskot mítt til allar føroyskar parlamentarikarar við ábyrgdarkenslu er tí hetta: Góðu løgtingsmenn - taka tit demokratiið í álvara, so gott í tykkum, gerið okkum føroyingum 18. september til nationalan sorgardag, har *demokratiskt-sinnaði* hampafólk tigandi drýpa høvur og minnast! Hetta kann fáa uppvaksandi ættarlið at hugsa seg um, og erkenna, hvussu spinkult demokratiið er, og hvussu skaðilig politisk fanatisma, einoygd fundamentalisma og totaliterir tvangstankar kunnu vera. Tað er royndur lutur, at nationalistiskur hugburður fyrr ella seinni altíð førir til terror ella reina fascismu!

Men nú allur tann demokratiski Vesturheimurin roynir at brynja seg móti terrorismu, eiga vit ikki at lata ta terror-skomm sita á okkum, at vit framvegis seta hesa absurdu parentes um eina ta fúlastu politisku beistagerð í føroyskari søgu!

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Tjóðveldisflokkurin sleit samgonguna við at leggja á løgmann og fólkaflokkin – m.a. orsakað av fíggjarstøðu landskassans. Tað sama eru javnaðarmenn og sambandsmenn farnir at sleingja út, hvørja ferð teir eru kroystir.

**Óttin fyri at spara og taka inn**

Onki kann vera meira fjart frá veruleikanum. Um Tjóðveldisflokkurin hevði viljað slitið fullveldissamgonguna, so vóru óteljandi høvi, har vit uttan himpr høvdu havt allar grundgevingar fyri at slíta. Tað var fólkaflokkurin, sum tvingaði løgmann at slíta og senda “teir ómøguligu tjóðveldismenninar til hús”.

Hinvegin var arbeiðið við fíggjarlógini fyri 2004 uttan iva ein orsøk til at Fólkaflokkurin sleit samgonguna. Kravið frá fíggjarmálaráðharranum, Karsteni Hansen, var sum altíð eitt yvirskot á fíggjarlógini. Og tað megnaði hann øll 6 árini hann sat – eisini tað seinasta. Og í hansara fíggjarlógaruppskoti fyri 2004 vóru greið uppskot uml, hvussu sparast skuldi og hvussu fleiri inntøkur skuldu fáast til landskassan. M.a. við at leggja avgjøld á vørur, at lata arbeiðsmarknaðin fíggja barsilsskipanina og at skerja rentustuðulin til sethúsalán.

Alt hetta var BD so hart ímóti, at hann noktaði at taka lut á fleiri fundum um fíggjarlógina. Hann boðaði eisini skrivliga frá, at hann tók ikki undir við tí fíggjarlógaruppskoti, sum Karsten Hansen legði fram, tí hann góðtók hvørki sparingarnar ella nýggju inntøkurnar á hansara egna málsøki.

**Eitt krav, sum ongin kundi uppfylla**

Tað var tí eitt gylt høvi hjá ÓB og BD aftur at royna at fáa Tjóðveldisflokkin at slíta samgonguna, tá ein bók kom út um m.a. fortíðina hjá løgmanni. Onkusvegna visti Fólkaflokkurin um hesa bók. Og sum ketta burturúr høvdatrogi – áðrenn nakar hevði sæð nakra bók – valdi Fólkaflokkurin at senda Tjóðveldisflokkinum eitt brævi, har teir kravdu, at Tjóðveldisflokkurin reinsaði Løgmann fyri innihaldið í eini bók, sum vit ikki høvdu sæð. Brævið varð sent til allar fjølmiðlar, áðrenn tað var Tjóðveldisflokkinum í hendi.

Øll vita, at tað var sjálvsagt ógjørligt hjá Tjóðveldisflokkinum at skula reinsa løgmann fyri nakað sum hent var fortíðini.

Men á henda hátt offraði Fólkaflokkurin samgonguna og løgmann til tess at sleppa frá fullveldinum og fíggjarpolitikkinum hjá Tjóðveldisflokkinum. Og tað varð gjørt so snilt, at bæði ÓB og BD úteftir kundu látast at stuðla løgmanni og gera hann til píslavátt. Meðan Tjóðveldisflokkurin skuldi standa eftir sum teir ómøguligu og rabiatu bandittarnir – ja, skuldi passa í júst ta myndina, sum ÓB og BD høvdu roynt at geva av Tjóðveldisflokkinum síðani 80’ini og sum teir messa upp í saman enn í dag.

Úrslitið kenna vit øll. Taktikkurin eydnaðist. Linjan hjá ÓB og BD hevur nú vunnið í Fólkaflokkinum. Bjarni Djurholm gjørdist varaløgmaður og fegnast dagliga um tann førda sambandspolitikkin og tekur frástøðu frá øllum, sum undanfarna samgonga gjørdi. Og – enn í hvussu er – fylgja hinir politikararnir í Fólkaflokkinum við. Tó hava Poul Michelsen og nakrar djarvar fólkaflokskvinnur váðað sær at tala at.

Soleiðis sær søgan út sæð frá einum, ið hevur verið við í gongdini alla vegin – og sum iðrar seg um, at vit lótu hesa gongdina fara alt ov langt, og at undirritaði var alt ov veikur í avgerandi løtum.